

# Posta Stamps
Føroyar

Nr. 12
Apríl 2012

ISSN 1603-0036

**Fýra nýggjar frímerkjaútgávur**
**Postgjaldsmerkini 2012**
**Ársins frímerki 2011**

Posta
FAROE ISLANDS




# Regin smiður




FO 739-44 Royndarprent

*Grani bar gullið av heiði,*
*brá hann sínum brandi av vreiði,*
*Sjúrður vann av orminum,*
*Grani bar gullið av heiði.*

Í øllum mentanum finnast endurljóð av mýtiskum mentanarminnum – eitt slag av frummyndarligari endurspeglan av hugaheiminum hjá okkara forfedrum – teirra fyrimyndir, teirra trúgv og royndir at greina alheimin á andaligum og handaligum støði.

Eitt av hesum afturvendandi mentanarminnum í evropiskari mentan eru søgurnar um hvussu tann mýtiski ormurin varð at bana. Hesin kemur fyri í ymsum skapi og undir ymsum nøvnum, men í stuttum er tað søgan um mentanarhetjuna, ið, hóast harðar kostir, fær bast tí mikla drekanum ella orminum í tí mýtiska landslagnum.

Í føroyskari mentan finna vit søguna um ormin og banamann hansara í stóra kappkvæðnum "Sjúrðar kvæði". Kvæðið er í roynd og veru trý kvæði, rópt tættir – Regin smiður, Brynhildar táttur og Høgna táttur. Brynhildar táttur kom út á fýra frímerkjum fyri mongum árum síðani.

Gongdin í Regin smiði er í stuttum hendan: Sigmundur Vølsungson ríður saman við øðrum út í bardaga við Hundings synir (Húnamenn). Í einum bardaga við sævarstrendur tapa Sigmundur og hinir, og eingin teirra kemur aftur í aftur.

Hjørdís, unga kona Sigmunds, undrast yvir at hann ikki kemur heim, og fer út at leita eftir honum. Hon finnur hann á valinum, illa løstaðan, men áðrenn hann andast, sigur hann Hjørdis frá at hon ber eitt dreingjabarn ið skal hevna deyða hansara. Hann gevur Hjørdís brotna svørð sítt og sigur henni frá um Regin smið, ið kann væla um svørðið, og um mikla ormin Frænir, ið liggur úti á Glitraheiði.

Tá Sigmundur er deyður og jarðaður, giftist Hjørdís upp aftur við Hjálprek kongi – og tá hon hevur gingið sínar níggju mánaðar, føðir hon ein frískan og raskan drong, ið hon kallar Sjúrður.

Sjúrður veksur upp í ríki Hjálpreks og mennist til ein sterkan og raskan ungan mann, sum tó hevur ávísar trupulleikar av síní ómetaligu styrki og vreiði. Ein dagin tá hann er komin at løsta og drepa nakrar felagar á venjingarøkinum, harta hinir hirðmennirnir hann fyri harðskapin, og siga at hann heldur skuldi hevnt faðirs síns deyða enn at løsta teir í stórum.

Sjúrður fer til móðir sína fyri at frætta hvør drap Sigmund, og hon gevur honum tað brotna svørðið og sigur honum frá Hundings synum, frá Regin smiði og orminum Frænir.

Eftir móðurs ráðum, fer Sjúrður so oman til eina á, har hestar ganga á beiti við áarbakkan. Hann tveitir ein stein í ánna og velur so tann hestin, ið ikki hvakk við av brestinum. Hetta var Grani, ein ómetaliga stórur greðingur, ið síðan gjørdist kendur sum Sjúrðar hestur.

Árla ein morgunin ríður Sjúrður út fyri at finna Regin smið. Hann gevur smiðinum tað brotna svørðið og biður hann um at smíða



tað aftur.  Regin setur svørðið í eldin í tiggju nætur og smíðar tað aftur.  Men tá Sjúrður roynir svørðið við at høgga tað í stiðjan, brotnar tað aftur.

Sjúrður verður í øðini og lovar at drepa Regin, um hann ikki ger svørðið so hart at tað bítur á bæði jarni og gróti, men tá leggur Regin tær treytir við, at hann so vil hava ormsins hjarta afturfyri.  So leggur Regin svørðið aftur í eldin, hesa ferð í tríati nætur og smíðar tað  aftur.  Tá Sjúrður roynir tað aftur, fer tað gjøgnum bæði stiðja og stabba uttan hóvasták.  Tá er Sjúrður endiliga nøgdur og kallar svørðið Gram.

So ríður Sjúrður út at hevna sín faðirs deyða. Hann drepur Hundings synir og ger seg síðan til at ríða út á Glitraheiði fyri at finna tann mikla ormin.  Ávegis út á heiðina hitta Sjúrður og Regin ein gamlan einoygdan mann – Óðin – ið ávarar Sjúrða móti Regini. Hesin vil svíkja Sjúrð sigur hann, men Sjúrður tekur ikki við ráðunum.

Úti á Glitraheiði er ormurin skriðin av gullinum.  Hann er ómetaliga stórur, men tað heldur ikki Sjúrða aftur.  Hann setist á Grana bak og ríður fram móti Frænir – og við einum megnar høggi klívur hann ormin av um miðju.  Áðren Frænir doyr, sigur hann Sjúrða frá at hann og Regin eru brøður og at smiðurin hevur svik í huga.

Tá ormurin er deyður, setur Sjúrður ormsins hjarta á ein tein og fer at steikja tað til Regin. Tá tað hevur stokt eina tíð, nertir hann við tað, fyri at vita um tað er við at vera moyrt. Men hann brennir seg um fingrarnar og tá hann stingur teir í munnin, kemur hann at svølgja eitt sindur av soðnum frá steikini.  Tá gerst hann brádliga alvísur, og skilur fuglaog djóramál.  Fuglarnir ávara hann aftur móti Regini, og siga at Sjúrður skal taka smiðin av døgum og sjálvur eta steikina.

Tá skilur Sjúrður loksins, at veruligi dýrgripurin er ormsins blóð og hjarta.  Hann fer til Regin, ið liggur og sleikir sveitan av jørðini og høggur høvdið av tí svikafulla smiðinum. So stáplar hann gullið á Grana bak og saman ríða teir so heim aftur til Hjálprek kongs lond.

Og hetta var søgan um Sjúrð og hvussu hann vann á orminum.  Tað er sjálvandi mangt at siga frá um týdningin av søguni, men tað hava vit ikki pláss fyri her.  Í staðin fyri leggja vit nakrar greinar á heimasíðuna www.tjatsi.fo, við ymsum tulkingum av hesi løgnu søgu.

*Anker Eli Petersen*







FO 745-746

Royndarprent



Edward Fuglø: Favorite Campingspot - 2008

# Norðurlendsk samtíðarlist

**Ein tvífald parafrasa ella nýtulking**

Uppskotið til tey bæði føroysku frímerkini kom frá Niels Halm stjóra í Norðurlandahúsinum í Tórshavn. Við hesum verður Posta Stamps ein partur av tí forvitnisligu norðurlendsku samtíðarlistini. Vanliga geva vit bert frímerki eftir føroyskum listafólki út í Føroyum, men tá tað í hesum førinum er talan um eina svenska nýtulking av einum føroyskum verki og øvugt, eru hesi bæði frímerkini slóðbrótandi sum ein felags norðurlendsk verkætlan.

**Mr. Walker in the Faroes**

Tað er svenski myndlistamaðurin Jan Håfstrøm (f.1937) sum hevur gjørt myndina. Evnið er ein hálvt burturvendur maður dulklæddur undir hatti og í myrkum sólbrillum. Hann sær ikki júst út sum ein náttúruvallari, kanska heldur ein detektivur úr eini teknirøð, sum er komin úr stórbýnum til Føroya, ílatin puntutum frakka. Hann hyggur út yvir eitt eyðkent føroyskt lendi, nevniliga ein part av myndini "Favorite Campingspot" frá 2008 hjá Edwardi Fuglø, sum Tórshavnar Kommuna eigur. Her er talan um eina sonevnda parafrasu, t.v.s. eina tillaging ella viðgerð av verkinum hjá einum øðrum listamanni. Er maðurin frystur fastur í royndini at skilja náttúrunnar veldi? Stendur hann og skoðar Edwardsa málning á listasavninum? Ella kanska hann eygleiðir eitt av teim smáu húsunum, har ein illgerningur stutt frammanundan er farin fram, og sum hann er komin higar at avdúka? Vit vita tað ikki og fáa tað heldur ikki at vita, men tað er skilligt, at hann er fremmandur í Føroyum, og tað gevur tí tvískilda myndevninum ein hugtakandi spenning.

Tey smáu, ljósagrønu húsini standa millum eina gøtu og ein foss, sum - hvítur sum snjó - stoytir sær út av fjallatromini. Fjallið endar brádliga við brøttu fjallasíðuni, sum sæst so mangastaðni í Føroyum. Vit síggja ikki havið, tí maðurin skuggar fyri tí, men øll, sum hava upplivað Føroyar, kunnu ímynda sær tað uttanfyri myndakarmin. Tá flogið verður til Føroya koma tær vøkru, grasgrønu basaltoyggjarnar knappliga til sjóndar mitt úti í víða Norðuratlantshavi. Øll, sum kenna hesar ótrúligu oyggjar vita, at ein skal ansa sær fyri ikki at detta fyri bakka.

Loyndarfulli maðurin er harra Walker, Jan Håfstrømsa alter ego, sum somuleiðis líkist faðir hansara, sum var ferðahandilsmaður og tí ofta burturstaddur í barnaárum Håfstrøms. Hann sá mest bakið á faðir sínum, tá hesin var á veg út í stóru verð. Summarið 2011 kom "Walker" til Føroya í sambandi við framsýningina "Kosmiskur svøvngangari" í Norðurlandahúsinum. Her hevði listamaðurin framsýning saman við Knud Odde og gjørdi eitt steinprent yvir evnið á grafiska verkstaðnum hjá Jan Anderson í Tórshavn.



Jan Håfstrøm:: Kappaklæddir menn við barnakistum

Jan Håfstrøm hevur fingið fleiri virðislønir og hevur umboðað land sítt fýra ferðir á prestisjumettu listastevnuni La biennale di Venezia. Hann verður mettur sum største núlivandi listamaður í Svøríki.

**Edward Fuglø: Egg procession for Jan**
Edward Fuglø er borðin í heim í Føroyum í 1965. Hann er ein surrealistiskur listamaður við serstakliga góðum hugflogi, sum hevur endurnýggjað føroysku listina við sínum originalu verkum, sum bæði sýna skemtingarsemi og samfelagskritikk. Hann býr og starvast í Klaksvík, og verk hansara eru m.a. at síggja á Listasavni Føroya.
Myndevnið á 21 kr. frímerki hansara er eitt fuglaegg, eitt afturvendandi evni í hansara listarligu framleiðslu, sum telur fleiri miðlar og sum hann stundum framber í trimum dimensjónum. Tað er eitt yvirvaksið fuglaegg, sum kann tulkast sum eitt tjóðareyðkenni um fuglaveiðuna í Føroyum og sum eitt tekin um fruktbari, náttúru og framtíðarvónir.

Ein munkur klæddur í munkakappa gongur fremst berandi tað stóra eggið, eftir honum koma tríggir aðrir munkar, somuleiðis í munkakappum. Tveir teirra halda einum brennandi kyndli so tætt at egginum, at tað er vorðið glóðreytt, kanska fyri at skunda undir klekingina? Seinasti munkurin ber ein langan stav í hondini. Munkarnir við sínum fjaldu andlitum tykjast loyndarfullir og daprir.

Frímerki hjá Edwardi Fuglø er somuleiðis ein parafrasa yvir eitt verk hjá hansara svenska starvsfelaga Jan Håfstrøm, sum í umrøddu framsýning í Norðurlandahúsinum bæði hevði avmyndað hesar kappaklæddu munkar og lat framføra ein dans við kappaklæddum dansarum, sum var koreograferaður av framførslulistakvinnuni Lottu Melin. Teir kappaklæddu dansararnir dansaðu fyrst rundanum Norðurlandahúsið og hildu so fram innandura. Men har dansararnir bóru eina barnakistu, sum sýnir tað allarversta nevniliga barnadeyða, so eru teir kappaklæddu hjá Edwardi øðrvísi lívsjáttandi og humoristiskir orsaka av tí yvirvaksna egginum, sum kann bera eitt ótal av fuglaungum. Soleiðis er Edwardsa myndevni ein visuelt áheitandi sameining av verkunum hjá báðum listarmonnunum og samstundis ein fagnaður til sín svenska starvsfelaga, sum eisini fagnar sínum yngra føroyska starvsfelaga við sínum frímerki við føroysku náttúruni.

*Lisbeth Bonde*
*Listaummælari og rithøvundur*







FO 747 Royndarprent

# Gl. apotekið í Klaksvík 80 ár

Gamla apotekið – handilshúsini úti í Klakvík

Hóast tað finnast toftir heilt aftur úr víkingatíð, er Klaksvíkin, sum vit kenna hana í dag, ein rættuliga ungur býur. Rundan um ta stóru vánna lógu upprunaliga fýra garðar ið so við og við mentust til ósamanhangandi býlingarnar: Gerðar, Myrkjanoyri, Vágur og Uppsalir. Fólkatalið var lítið, í 1802 vísti fólkateljingin at 88 fólk búðu í teimum fýra býlingunum.

Um tað mundið var allur handilsskapur í Føroyum rikin av kongaliga einahandlinum í Havn. Tað sigur seg sjálvt at hetta ikki var serliga mennandi fyri land og fólk – og við teimum politisku og samfelagsligur broytingum, ið fóru fram í Danmark og øðrum Norðanlondum fyrst í 19. øld, vaks eisini kravið um fríhandil í Føroyum.

**Úthandlar**

Í 1830'unum varð avgjørt at styrkja Kongaliga Einahandilin og annars fyrireika fólkið í Føroyum til eina komandi fríhandilsskipan. Sum ein part av hesum tiltøkum, vóru úthandlar settir á stovn runt um í landinum. Fyrsti úthandilin varð lagdur á Tvøroyri í 1836, tvey ár seinni, í 1838, varð úthandilin í Klaksvík latin upp at røkja Norðoyggjar, og í 1839 lat úthandil upp í Vestmanna fyri at røkja oyggjarnar vestanfyri.

**"Etablissementet Klaksvig"**

Sum nevnt, varð úthandilin fyri Norðoyggjar latin upp í 1838. Hann var lagdur eitt sindur norðanfyri býlingin Vág og varð róptur "Etablissementet Klaksvig", eftirsum hann lá við eina vík undir fjallinum Klakkur. Hettar var orsøkin til at norðuri í Vági skifti navn til Klaksvík, eitt navn ið síðan kom at umfata allar býlingarnar við vánna.

Upprunaligu handilshúsini er tann norðasti av teimum samanhangandi bygningunum vit kenna í dag, vanliga rópt "gamla pakkhús". Umframt hetta vóru eisini eini sethús reist til handilsfaktorin, nøkur úthús og ein lítil bryggja niðri í fjøruni. Frá 1839 var faktorurin fyri úthandilin hin navnframi Jóhan Mortensen, ið, eftir at fríhandilin varð innførdur, bygdi tað máttmiklu Mortensen



Handilshúsini "Úti í Klaksvík"
Mynd: A.E. Petersen

handilsfyritøkuna á Tvøroyri

**Nýggja pakkhús**
Sum tíðin leið, vaks virksemið hjá úthandlinum og í 1847 bygdu teir ein stóran bygning í tveimum hæddum sunnanfyri upprunaligu handilshúsini. Hetta húsið róptist "Nýggja pakkhús". Tað var altso upprunaliga talan um tvey óheft hús, og tað er ikki fyrr enn seinni, uml. 1896, at húsini eru bygd saman. Inni í nýggja pakkhúsi kann man enn síggja búmerkið hjá Kongaliga Einahandlinum, ein veingjaprýddur Hermes hjálmur, útskorið í ein av durakarmunum. Hettar búmerkið er tað einasta ið er eftir í Føroyum. Hermes var gudur handilsmanna í griksku gudalæruni.

**Avtøkan av einahandlinum**
Við lóg frá 21. mars 1855, samtyktu danskir myndugleikar, at einahandilin skuldi avtakast í Føroyum. Avtøkan skuldi fara fram tann 1. januar 1856, men tað gekk ein tíð fyrr enn glið kom á. 1. mai 1856 varð so uppboðssøla hildin yvir ognirnar hjá einahandlinum í Klaksvík. Í harðari kapping við aðrar áhugaðar keyparar, eydnaðist tað umboðsmanninum hjá danska handilsmanninum og tubbaksframleiðaranum Jørgen Bech at keypa samlaðu ognirnar fyri 6.210 ríkisdálar.

**Nýggjar tíðir**
Einahandilstíðin var nú av í Føroyum og avtøkan førdi til eina ógvusliga fíggjarliga og samfelagsliga menning. Nýggjar handilsfyritøkur vóru settar á stovn og byrjaðu at menna føroyska handils- og reiðarívirksemi og tann vaksandi fiskaídnaðin.

E. E. Meijer, sum vegna Jørgen Bech & Søn hevði keypt ognirnar hjá einahandlinum í Klaksvík, helt fram sum umboðsmaður fyri fyritøkuna í Føroyum í fýra ár afturat. Gamli faktorurin, Johan Mortensen, helt fram í hálvtannað ár í fyritøkuni, til hann flutti suður á Tvøroyri og bygdi Mortensens handil, sum í mong ár var størsta handilshús og reiðarí í landinum.

Í 1858 tók J. C. Djurhuus við sum faktorur hjá Jørgen Bech & Søn, og stjórnaði handlinum tey næstu 50 árini. Hettar tíðarskeiðið vaks fyritøkan í stórum, og hevði úthandlar ymsastaðni í landinum.

Jørgen Bech doyði í 1870 og sonurin Peter Bech yvirtók donsku fyritøkuna. Um somu tíð, keypti danski handilsmaðurin og politikarin J. Gustav Hansen seg inn og í 1907 átti hann alla fyritøkuna.

Fríhandilin fekk stóran týdning fyri menningina av Klaksvík. Longu í 1865 átti Jørgen Bech fleiri fiskiskip og hetta sást aftur í fólkatalinum, sum í 1907 fór um tey 700. Hóast menningin ikki varð líka so ógvuslig sum á Tvøroyri, var Klaksvík gott ávegis at broyta seg frá gamla bóndasamfelagnum til fiskivinnusamfelag. Við stuðli frá Peter Bech og J. G. Hansen, vóru skúlar bygdir, lækni kom til býin og við aldamótið vóru fýra handlar í Klaksvík. Í 1910 varð ein sleipistøð til maskinbátar bygd við gomlu handilshúsini - og grundarlagið var yvirhøvur lagt fyri framtíðar menningini til Føroya størstu fiskaríhavn.

Í 1915 lat tann dugnaligi handilsmaðurin J. F. Kjølbro handil upp í Klaksvík, og hetta gjørdist byrjanin til eina ógvusliga menning. Eftir fáum árum vaks Kjølbro til størstu fiskarífyritøkuna í landinum við einum stórum flota av fiskisluppum, og seinni motoriseraðum skipum av ymsum slag. Harafturat fekk fyritøkan sítt egna flakavirki og sleipistøð. Í 1920 og 30 árunum flutti fólk í stórum tali til Klaksvíkar at búgva og arbeiða og bert eina øld eftir at Einahandilin hevði latið úthandil upp við tað heldur fólkatómu vánna á Borðoynni, hevði Klaksvíkin ment seg til næststørsta bý í Føroyum og størstu fiskivinnuhavn í landinum.

**Gamli handilin**

Ná, men aftur til gomlu handilshúsini. Í 1883 varð sjálvur handilin fluttur úr gomlu hølunum yvir í nýggja húsið. Á fyrstu hædd var handil, meðan ovara hæddin, sum tá var eitt stórt rúm, varð nýtt sum m.a. vín og spiritusgoymsla. Hetta fram til 1908, tá beinleiðis søla av rúsdrekka var bannað við lóg og skamtan varð innførd.

**Toystovan**

Handilin hjá Jørgen Bech & Søn seldi blandaðar vørur. Millum annað seldu tey eisini klæðir, og tá tørvurin fyri einum rættiligum klædnahandli vísti seg, avgjørdu tey at innrætta eina toystovu umframt skrivstovur á ovaru hædd.

Arbeiðið við at innrætta hæddina byrjaði í 1918 og handverkarar úr Havn komu norður at gera arbeiðið. Ein av hesum var tann navnframi Magnus Jacobsen (Magnus á Kamarinum), sum prýddi loftsbjálkar og vindeygu við sínum vøkru træskurðum. Hann gjørdi eisini pultar og skar hillar.

**Málningarnir**

Umframt vøkru útskeringarnar, er toystovan eisini prýdd við 17 smáum málningum, málaðir beinleiðis á veggjabjálkarnar undir loftinum. Hesir málningar hava myndevni av landsløgum ymsastaðni í Føroyum, og frá Klaksvík og Norðoyggjum – fiskipláss, skip og handilshúsini. Ellivu av hesum eru málaðir av klaksvíksmálaranum Eliesar Joensen, fýra av Jens Christian Guttesen, málarasveini úr Havn, meðan tað ikki kann staðfestast hvør hevur málað restina.

Inni í toystovuni er ein diskur við hestaskógvaskapi, so at viðskiftafólkið slapp inn í handilin uttan at koma á skeiva síðu. Harafturat er eitt stórt borð mitt í rúminum, har handilsfólkið kundi breiða klæði út til



Gamla apotekið í Klaksvík
Mynd: A.E. Petersen

framvísing og tilskering. Hetta borðið hevur skuffur allan vegin runt, so plássið kundi nýtast til goymslu av smálutum. Eisini diskurin hevur hillar og skápshurðar til goymslu.

**Apotekið**

Í 1931 fór fyritøkan ið rak handilin av knóranum og kommunan keypti bygningarnar. Um hettar mundið var tørvur á einum apoteki í býnum, og Tjaldurs apotek, ið annars bara fanst í Havn, leigaði seg inn í fyrrverandi toystovuna, har tey gjørdu eitt apotek fyri Klaksvík og Norðoyggjar í 1932.

**Rumið, ið tíðin gloymdi**

Í 1961 stóð nýggja apotekið liðugt bygt og tað gamla varð niðurlagt. Skrivstovurnar vóru leigaðar út til annað endamál, men toystovan stóð órørd til Norðoya Fornminnissavn yvirtók bygningarnar í 1975. Í hølunum fanst tað niðurlagda apotekið, fult útgjørt við upprunaligu apoteksfløskunum, krukkum og amboðum til framleiðslu av heilivági og tablettum. Í 1983 lat Norðoya Fornminnissavn apotekið upp sum framsýning. Hettar er, saman við apotekinum í "Den gamle by" í Århus, einasta fullkomuliga autentiska gamla apotek í danska ríkinum.

Rúmið ið tíðin gloymdi, er nú ein av gimsteinunum í føroyska fornminnissavninum. Gamla goymslurúmið ið gjørdist toystova í einari tíð, tá dentur varð lagdur á skreytprýðing og handverk – sum óbroytt varð til apotek, fyri síðan at standa, upprunaligt og órørt – endaði sum ein siðsøguligur tíðarlummi. Bara kenslan av at standa í einum rúmi, ið stórt sæð hevur staðið óbroytt meðan býurin vaks rundan um tað, er ørandi.

Um tú ein dagin ert í Klaksvík, so snýt ikki teg sjálvan fyri ta upplivingina at vitja hetta løgna rúmið og kenna dámin av farnum tíðum.

*Anker Eli Petersen*










FO 748-749 Royndarprent

# Jólasangir 3

**Hví man tað verða....**

*Tað er jólaaftan! Klokkan ring!*
*Bing bang bing! Bing bang bing!*
*Brátt er træið tendrað – slá so ring,*
*Dansa, kvøð og syng.*

Tað man neyvan vera nakar føroyingur ið ikki beinanvegin kennir tað fryntliga niðurlagið aftur í sanginum "Hví man tað vera so hugnaligt í kvøld?"

Í fimti ár hava vit hoyrt systkini Kára og Elin Mouritsen syngja tann glaða sangin, við undirspæli av gittara og banjo. Upptøkan er frá einari jólasending í nýbyrjaða Útvarpinum í 1957. Tey bæði børnini eru langt síðani vaksin til, júst sum vit onnur, men sangurin um longsulin eftir sól og ljósi á hávetri, megnar enn at flyta okkum aftur til barndómsins gandakendu jólaheimar.

Sangurin varð skrivaður av Christen Holm Isaksen (1877 – 1935), vanliga róptur Kristin í Geil. Bert 23 ára gamal gjørdist hann blaðstjóri á nýggja sjálvstýrisblaðnum Tingakrossur. Hann sat í hesum starvi, burtursæð frá einum stuttum avbrotið, til hann fyrst í tríatiárunum mátti leggja frá sær vegna sjúku.

Kristin í Geil var kendur fyri sína greiðu støðutakan í flestum málum. Hann breyt frá tí ráðandi tjóðskaparromantisku rásini til fyrimuns fyri nýggja naturalistiska mentanarrákinum og mælti til at sjálvstýrisrørslan eisini skuldi hava eina sosialistiska síðu. Hann var kendur sum ein tann besti blaðmaður vit hava átt, og stríddist sum sovorðin fyri sjálvstýri, arbeiðararættindum og teimum minni mentu.

Sum mentamaður fevndi Kristin í Geil eisini víða. Hann var ein av undangongumonnunum í føroyskari myndlist, og tað finnast enn fleiri málningar frá hansara hond, m. a. í Sandavágs kirkju. Kristin var eisini virkin áhugasjónleikari og týddi og skrivaði leikir til sjónleikaraumhvørvið í Havn. Hann umsetti og yrkti eisini sangir, og tað gevur kanska eitt innlit í samansetta lyndið Kristins í Geil at nevna tríggjar teir kendastu: tann gitna sosialistslagsangin "Brátt lýsir í eystri" – tann romantiska valsin úr Kátu einkjuni "Kom og dansa, hjartans kæri skattur mín" – og so okkara egna lítla jólasang "Hví man tað vera so hugnaligt í kvøld?"

**Gleðilig jól**
Gleðilig jól, gleðilig jól,
ljóðar av himli einglalag.
"Armi syndari óttast ei nú,
gleðiboðskapin hoyrir tú:
Jesus er føddur í dag,
Jesus er føddur í dag!"

Á forsíðuni av desemberútgávuni hjá Føringatíðindi 1891 stendur ein lítil yrking undir heitinum Jóla-Sálmur, undirskrivaður F. P. Ein rættuliga lítillátin framløga av sanginum, sum meira enn nakar annar er sinnismyndin av jólunum – ikki bara í Føroyum, men um allan kristna heimin.

Sangurin, hvørs upprunaheitið er "Stille Nacht" varð fyrstu ferð framførdur tann 24. Desember 1818 í Nikolaus Kirche í býnum Oberndorf í Eysturríki. Hann var skrivaður tvey ár frammanundan av prestinum Joseph Mohr, og til gudstænastuna í 1818 hevði hann fingið rektarin og tónasmiðin Franz Xaver Gruber at seta lag til yrkingina. Gruber



Jólatræið á Tinghúsvøllinum
Mynd: Ólavur Frederiksen

gjørdi eina útseting fyri gittara (søgan sigur at tað var tí at urgan í kirkjuni ikki virkaði).

Hendan upprunaliga útsetingin var eitt sindur lívligari enn tann vit brúka í dag, mestsum eitt dansilag í 6/8 takt.

Tað vardi ikki leingi fyrr enn sangurin gekk sína sigursferð yvir heimin. Í 1850 týddi B. S. Ingemann hann til danskt og í 1859 týddi amerikanski bispurin John Freeman Young sangin til enskt undir heitinum "Silent Night" – sum í dag man vera best kenda frábrigdið. Akkurát hvussu mangar týðingar av Stille Nacht munnu vera, er ilt at siga við vissu, men talið liggur yvir 150.

Undirskriftin F. P. Í Føringatíðindi stóð fyri Fríðrik Petersen 1853 – 1917, sum tá var prestur í Suðuroy. Fríðrikur Petersen tók studentsprógv í Reykjavík í 1875 og gjørdist cand. teol. í Keypmannahavn í 1880. Eftir lokna útbúgving gjørdist hann prestur í Sandoy, frá 1885 í Suðuroy og frá 1900 og fram til deyða sín í 1917 var hann próvstur við sæti í Eysturoy. Fríðrikur Petersen var eisini politikari og var løgtingsmaður frá 1890, frá 1900 við føstum sæti í eginleika av próvstaheitinum. Hann var eisini limur í danska Landstinginum í tveimum umførum, frá 1884 – 1901 og aftur frá 1906 og til hann doyði í 1917.

Politiskt var Fríðrikur Petersen konservativur og sambandssinnaður. Tá klovningur kom í millum sambandssinnaðar og sjálvstýrissinnaðar løgtingsmenn í 1906, var Fríðrikur ein av stovnarunum av Sambandsflokkinum og var formaður floksins til hann doyði.

Longu í ungdómsárum var Fríðrikur Petersen hugtikin av føroyska málinum. Hann dugdi væl at málbera seg, var góður røðari og prædikumaður og skrivaði nakrar av teimum vakrastu sangunum og sálmunum í tjóðskapartíðini, millum aðrar, "Eg oyggjar veit", ið eitt skiftið var óalmenni tjóðsangur Føroya. Hann umsetti Faðir vár og trúarorðini til føroyskt, men í stríðnum, ið tók seg upp um kirkjumálið og týðingina av Bíbliuni, kom hann at standa sum mótstøðumaður til føroyskt í kirkjuni. Spurningurin er um hann hevði nakað val. Sum kirkjuligur embætismaður lá hann undir fyri kravinum um eina autoriseraða týðing úr upprunamálunum – eitt krav ið var ilt at uppfylla tá á døgum.

Kristin í Geil og Fríðrikur Petersen – tveir sera ymiskir menn og tveir sera ymiskir sangir um somu hátíð. Men eitt høvdu teir so í felag, teir ríkaðu báðir føroyska mentan og føroyskt mál við sínum gávum.

*Anker Eli Petersen*




Fyribils snið

# Postgjaldsmerki 2012 - **Føroyar Mítt Land**

"Margarinfabrikkin" - fekk til uppgávu at tekna postgjaldsmerkini 2012, sum skuldu hava "Street Art" sum evni.

Úrslitið gjørdist hesar fýra tekningarnar, sum tær ungu genturnar Saga Kapna og Laura Edit Tórhalsdóttir, sum saman nevna "Nadedita" hava teknað.

Tær royna við hesum fýra skemtiligu tekningunum av lundanum, tjaldrinum, veðrinum og grindahvalinum at lýsa fýra ymiskar persónstypur.

**Lundin - Miðla Horan**
Við sínum Paris Hilton designara sólbrillum stendur hann úti í haganum í Mykinesi og heldur seg vera sera týdningarmiklan.

Øll ið koma framvið á síni ferð, taka nógvar myndir av honum - og hann poserar altíð við einum stoltum andlitsbragdi, sum er hann ein heimskend modell (og tað er hann eisini).

Hann veit at hann er lekrastur og smartastur - hann umboðar kanska ikki Føroyar í Føroya søgu, men hann veit tó at hann er í roynd og veru tann týdningarmesti fuglurin.

**Tjaldrið - Hipster**
Tjaldrið veit, at tað er betri enn Lundin - Tjaldrið er tjóðfuglurin: Tað upprunaliga, tann sanna ímyndin av hvat Føroyar veruliga eru!

Eingin gevur sær far um Tjaldrið, ikki líka nógv sum um Lundan í hvussu so er. Men tað er bara gott, tí so leingi Tjaldrið ikki er mainstream, hevur tað møguleikan at fara ein túr oman í Sirkus og fáa sær ein kopp av té og lurta eftir Indie-Rokk, uttan at kenna seg eltan.

Og sjálvandi lurtar tað bara eftir teimum bólkunum, sum ongin annar hevur hoyrt um.

Tjaldrið elskar at ferðast í fjarskotnum londum um veturin, elskar at læra nýggjar mentanir at kenna. Tað gevur Tjaldrinum hægri samfelagsstøðu enn hinum djórunum í Føroyum, og tað dámar Tjaldrinum væl - at føla seg sum



yvirmann. Men, fyri Guðs skyld, skal tað ikki síggjast at Tjaldrið roynir!

**Veðrurin - Rokkarin**
Veðrurin er tann harði, hann veit akkurát hvat hann vil og hvar hann stendur í samfelagnum: Mitt á vegnum.

Hann flytur seg ikki tá ið tú kemur koyrandi í bilinum, líkamikið hvussu ótolin tú roynir at síggja út við at floyta í takt til "Vekk Av Vegnum" hjá M'as Blues Band.

Veðrurin er øgiliga væl dámdur millum ærnar. Í roynd og veru so væl dámdur, at tað í dag eru dupult so nógvir seyðir í Føroyum sum tað eru menniskju.

**Grindahvalurin – Emo/Pínslavátturin**
"*Hví elta øll meg altíð, skilja tey ikki hvussu eg havi tað?*"

Grindahvalurin er heilt svartur og eyguni sita djúpt.

Eingin skilir hann, hann ferðast í flokki saman við øllum hinum grindahvalunum - sum allir líkjast honum, í teirra svarta hami og vónleysu sál.

Tað einasta honum dámar er at svimja í einum havi av sorg.

*Saga Kapna og*
*Laura Edit Tórhalsdóttir*

# Vakrasta frímerkið 2011

1




2




3




Frímerkjasavnarar kring allan heim hava atkvøtt millum føroysku frímerkini, ið vórðu givin út í 2011 og úrslitið gjørdist hetta:

Nr. 1 gjørdist frímerkið Sepac frímerkið 2011 - FO 718. Hetta er ein fotomynd av Dranginum í Sundinum vesturi í Vágum. Johnathan Esper hevur tikið myndina.

Nr. 2 gjørdist frímerkjasmáarkið Annika í Dímun, FO 703-705. Edward Fuglø teknaði.

Nr. 3 gjørdist frímerkið, ið er tikið í viðarlundini í Kunoy - FO 709. Svanna Oknadal hevur tikið myndina"

Hepnu vinnararnir eru:

1) Gávukort á 2000,- kr frá Atlantic Airways:
Tordis Johannessen, Tórshavn

2) Mikkalinaglas:
Katrin av Kák, Tórshavn

3) Arbók 2010:
Finn Jespersen, Tórshavn

# 25 og 40 ára starvsdagur



*Alma Dalsgarð*



*Korinta Jarnfoss*

Hetta seinasta hálva árið hava vit á Frímerkjadeildini havt ikki færri enn tveir starvsdagar.

1. des. 2011 kundi Alma Dalsgarð hátíðarhalda at hon hevði starvast á frímerkjadeildini í 25 ár og 1. apríl 2012 kundi Korinta Jarnfoss halda sín 40 ára starvsdag.

Korinta byrjaði á Telefonstøðini, men kom í 1977 í starv á frímerkjadeildini.

Tær báðar hava starvast í kundatænastuni øll hesi árini og hava sostatt eisini verið við í tí tøkniligu menningini. Tá m.a. fyrsta teldan kom, sum øll máttu verða felags um og tá okkara fyrst heimasíða fór í luftina í 1995 og bíleggingarnar og brøv so smátt fóru at koma umvegis internetið.

Í dag er heimasíðan hjá frímerkjadeildini www.stamps.fo á sjey málum.

Eisini hava  hava tær verið við á mongum framsýningum bæði í Norðurlondum og aðra staðni í Evropa og hava sostatt havt høvið til at heilsa upp á nógvar frímerkjasavnarar og hetta hevur dámað teimum sera væl.

Vit ynskja Almu og Korintu hjartaliga til lukku við starvsdøgunum.

# Nýggjar frímerkjaútgávur - 24. september 2012




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Regin Smiður** |
| Útgávudagur: | 24.09.2012 |
| Virði: | 6 x 11,00 kr. |
| Nummur: | FO 739-744 |
| Frímerkjastødd: | 27 x 40 mm |
| Arkstødd: | 102 x 106 mm |
| Tekningar: | Anker Eli Petersen |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Beijing Stamp Printing House, Kina |
| Postgjaldsbólkur: | Miðalbrøv innanoyggja, 51-100 g |







Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Norðurlendsk samtíðarlist - parafrasir** |
| Útgávudagur: | 24.09.2012 |
| Virði: | 13,00 og 21,00 kr. |
| Nummur: | FO 745 - 746 |
| Frímerkjastødd: | 38,5 x 34,22 mm |
| Tekningar: | Jan Håfstrøm & Edward Fuglø |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv til lond uttanfyri Evropa 0-50 g og |




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Gl. apotekið í Klaksvík 80 ár** |
| Útgávudagur: | 24.09.2012 |
| Virði: | 8,50 kr. |
| Nummur: | FO 747 |
| Frímerkjastødd: | 64,0 x 23,0 mm |
| Lagt til rættis: | Anker Eli Petersen |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | LM Group, Kanada |
| Postgjaldsbólkur: | Miðalbrøv innanoyggja 0-50 g, |







Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Jólasangir 3** |
| Útgávudagur: | 24.09.2012 |
| Virði: | 6,50 og 10,50 kr. |
| Nummur: | FO 748-749 |
| Frímerkjastødd: | 27,0 x 40,0 mm |
| Lagt til rættis: | Anker Eli Petersen |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv innanoyggja 0-50 g og smábrøv til Evropu 0-50 g. |

Framsíðumynd: Gásadalur, Vágar. Myndatøka: faroephoto.com
Snið og uppsetan: Posta Stamps - Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo